# Lættari at vera útróðrarmaður

**Landingarmiðstøðin í Sørvági hevur gjørt tað nógv lættari at vera útróðrarmaður har vesturi**

**FISKIVINNA**

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin

Landingarmiðstøðin í Sørvági hevur havt stóran týdning fyri útróðurin har vesturi.

Tað var í 1998, at Vinjard Falkvard Joensen setti Landingarmiðstøðina á stovn.

Bókligan førning hevði hann ikki so nógvan av, men hann hevði verið sjómaður alt lívið og kendi tí umstøðurnar til fulnar og helt, at okkur átti at vera gjørt – og tað gjørdi hann so.

Tað var nógv frammi tá á døgum, at tað var torført hjá útróðrarmonnum í útjaðaranum at fáa sama prís fyri fiskin, sum útróðrarmennir í miðstaðarøkinum fingu.

Tað var ein orsøk til, at Landingarmiðstøðin varð sett á stovn, stutt eftir at Fiskamarknaðurin var byrjaður.

Men ein orsøk til at seta Landingarmiðstøðina á stovn, var eisini at royna at gera tað lættari at vera útróðrarmaður.

Nú kunnu útróðrarmenn avreiða fiskin til Landingarmiðstøðina, so eru teir leysir av veiðini og kunnu fara til húsar at hvíla seg og gera klárt til næsta túr.

Fiskurin verður síðani skildur og seldur umvegis fiskamarknaðin.

Fyrr skuldu høvdu útróðrarmenninir alt stríðið sjálvur.

Og tað skerst ikki burtur, at útróðrarmenn vóru fegnir um tað framstigið tað var at fáa eina landingarmiðstøð.

Pole Falkvard Joensen, sonur, sum nú er leiðari á Landingarmiðstøðini, kom sjálvur upp í virksemið í 2003 eftir at pápi hansara doyði.

Um somu tíð keypti Landingarmiðstøðin ein virkisbygning á bryggjuni í Sørvági og innrættaði hann til landingarmiðstøð, so umstøðurnar batnaðu.



*Landingarmiðstøðin hevur havt týdning fyri fiskaprísin og útróðrarmenn eru fegnir um at hava fingið tað lættari*

## Havt týdning

Hann heldur Pole Joensen eisini, at Landingarmiðstøðin hevur havt týdning fyri kappingina um fiskin og hevur gjørt sítt til at prísirnir hækkaðu.

Hann sigur, at Landingarmiðstøðin hevur øll árini havt samstarv við Fiskamarknaðin.

- Tað er eitt samstarv, sum hevur verið fyrimyndarligt alla tíðina, sigur hann.

Nógva staðni frættist, útróðurin er við at fánað burtur, men har vesturi er útróðurin framvegis ein vinna.

- Tað er upp og niður. Eru góðar tíðir, leggjast menn á land og útvega sær bát at rógva út við. Er minni at fáa, minkar burturav aftur, sigur Pole.

Herfyri vórðu Farmaleiðir hjá Strandferðsluni einskildar og mong stúrdu fyri, at tað fór at vera eitt afturstig fyri tey úti um landið, sum skuldi hava vørur til og frá.

Men Pole Joensen sigur, at tað hevur ikki verið nakar trupulleiki, so hjá teimum hevur saknur ikki verið í Farmaleiðir, tí teir privatu røkja uppgávuna fullvæl.

Landingarmiðstøðin tekur sjálvandi ímóti øllum fiski, ikki bara frá útróðrarbátum, men eisini frá trolarum, línuskipum, garnabátum ella, hvat tað skal vera. Og tað verða eini 5.000-6.000 tons avreidd til Landingarmiðstøðina um árið, alt eftir, hvussu fiskiskapurin er.

Fýra mans arbeiða fast á Landingarmiðstøðini, men er nógv at gera, eru teir fleiri, upp í 15 mans, tá ið mest er at gera.




...altíð trúfastur

Allir føroyingar kenna Álmanakkan, sum H.N. Jacobsens Bókahandil nú í 78 ár, hevur givið út. Álmanakkin liggur umborð á øllum skipum og bátum og er eitt neyðugt amboð hjá øllum sjófólkum og teimum, sum hava við vinnu at gera. Eitt eintak av Álmanakkanum man eisini standa á flestu skrivstovum í landinum.

Hetta er 79. árgangur av Álmanakkanum og við núverandi upplagi, sum er 5.000 eintøk, er Álmanakkin eitt tað mest lisna og brúkta uppslagsverkið í landinum. Álmanakkin verður lisin og brúktur alt árið. Fólk eru von at finna upplýsingar og lýsingar um vørur og tænastur, tey hava tørv á, í Álmanakkanum.

**Heftur:** kr. 145,- **Heilbind:** kr. 190,-

Fæst kring alt landið

H.N. Jacobsens Bókahandil
TEL. 311036

www.foroyaprent.fo